## Grasið í Parkini ov vánaligt

Danski landsliðsvenjarin Morten Olsen heldur, at donsku fótbóltsvøllirnir eru í ov vánaligum standi. Tí vildi Morten Olsen ikki gera ein meting av tekniska støðinum í dystinum ímillum FCK og Børndby í Parkini í gjár.

– Hetta er ikki nóg gott. Eg havi tosað við FCK um vøllin, og eg haldi, at í Parkini eiga teir at leggja nýtt gras á tvær ferðir um árið, sigur Morten Olsen við Onside.

Hann heldur, at veðrið forðar fyri, at vøllirnir eru í góðum standi, og hann heldur, at danskir spælarar hava sera vánaligar arbeiðsumstøður hesa tíðina á árinum.



## AaB-liðformaður á veg til Noregs

Málmaðurin hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen í AaB, Jimmy Nielsen, skal møguliga til Noregs at spæla fótbólt. Felagið Viking váttar, at tað er áhuga í at gera ein sáttmála við Jimmy Nielsen, sum eisini er liðformaður hjá AaB. Viking hevur sum er tríggjar málmenn, men allir hava stutta tíð eftir av sáttmálanum, og felagið er farið at leita eftir einum nýggjum manni at vera málið. Sambært Aftenbladet stendur Jimmy Nielsen ovast á ynskilistanum.



*Báðir partar løgdu heilt nógv fyri, tá NSÍ og GÍ tókust í Sarpugerði sunnudagin*

*Mynd: Álvur*

GÍ-NSÍ 1-1 (1-0):

# Javnleikur í eysturoyaruppgerðini

*GÍ*

*NSÍ*

**GÍ spældi við 10 monnum seinastu løtuna, men tað eydnaðist tó ikki NSÍ at gera sær dælt av yvirtalsstøðuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Intensitetur plagar oftani at vera høgur, tá NSÍ og GÍ takast í tí, sum av nøgvum verður rópt eysturoyaruppgerðin.

Soleiðis var eisini hesaferð, og við nógvum nærdystum, spentum støðum og einum reyðum korti livdi dysturin í Gøtu eisini upp til vónirnar í so máta.

Dramatikkinum syrgdi Hans Jørgen Djurhuus fyri, tá hann sá gula kortið fyri aðru ferð í dystinum, og so gjørdist talan um rættiligt NSÍ-trýst seinastu løtuna.

### Trýstir seinastu løtuna

Undan hesum hevði talan tó fyri tað mesta verið um eitt rættiliga javnan dyst í Sarpugerði.

Gøtumenn vóru kanska teir stinnaru undan steðginum, men talan var um fleiri møguleikar báðar vegir, og málverjarnir vóru á ongan hátt arbeiðsleysir.

Tað eydnaðist tó hjá GÍ at leggja seg á odda, tá Poul Ennigarð stútaði eitt innlegg í kassan, og við leiðsluni kundi GÍ hampuliga róliga fara at hvíla seg í steðginum.

Leiðslan gjørdi eisini sína ávirkan á spælið eftir steðgin. Gøtumenn lógu nú nakað aftari á vøllinum, og royndu soleiðis heldur at binda um heilan fingur. Av tí sama gjørdist tað eisini so sum so við skipaða fótbóltsspælinum. Men hóast trýstið frá gestunum, so mundu teir í GÍ iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at halda fast í leiðsluni. Eitt nú var Sverri Jacobsen um reppið at økja til 2-0, men í evstu løtu fekk Pól Thorsteinsson ruddað á strikuni, og ístaðin var tað NSÍ, sum kundi javna stutta løtu seinni.

GÍ hevði annars ikki tað stóra at vera bangnir um, tá teir áttu fríspark frammarliga á vøllinum, men brádliga gekk heilt skjótt hinvegin. Runavíkingarnir fóru við fullari ferð niðan, og tá Christian Høgni so varð sendir avstað, sveik hann ikki álitið.

Og tá GÍ so løtu seinni misti Hans Jørgen Djurhuus, stóð knappliga heilt nógv á. Runavíkingarnir, sum høvdu greiða stevnu um trý stig, trýstu av øllum alvi, men talan gjørdist tó ikki um teir heilt stóru møguleikarnar. Heldur ikki í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, fall nøkur avgerð, og so máttu liðini semjast um eitt stig í part.

### Bæði mistu

Sum so kundu báðir partarnir ikki kenna seg heilt snýttar við stigabýtinum, men tað skerst ikki burtur, at trý stig høvdu verið ógvuliga kærkomin fyri bæði. Ikki minst hjá NSÍ, sum enn hevur eitt fitt petti eftir, áðrenn teir kunnu rópa seg fyri part av oddastríðnum.

Soleiðis, sum úrslitini hjá GÍ hava verið í ár, so er ein javnleikur í Gøtu tó eingin vanlukka. Gøtumenn tykjast nú aftur at leita sær á gamlar slóðir, tá liðið støðugt var partur av føroyska fótbóltsoddinum, og í so máta misti liðið tvey ógvuliga týðandi stig í mun til sigrandi oddaliðini úr Klaksvík og Eiði. Heilt mist takið hevur GÍ tó á ongan hátt, og verður støðugt hildið fast um góða stríðsandan, sum hevur eyðkent spælið higartil, so er hóttandi støðan frá í fjør fullkomuliga veruleikafjar.

## Veteranurin trívist á bakkinum

**Magni Jarnskor hevur í ár spælt óvanda plássið á vinstra bakki, men hetta er tó nakað, sum honum dámar heilt væl**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av broytingunum, sum Petur Mohr hevur gjørt á GÍ-liðnum í ár, er at hann hevur umskúlað onkrar av annars væl royndu kreftunum. Eitt nú hevur Poul Ennigarð fyri tað mesta verið partur av miðvøllinum í ár, meðan Magni Jarnskor hevur tikið sær sæti afturi á vinstra bakki. Eitt pláss, sum veteranurin sigur seg trívast heilt væl í.

– Hetta er fínasta slag. Sum gamal miðvallari haldi eg meg hava fínt pláss her afturi, og tú hevur eisini nógv betri yvirblikk, tá tú stendur somikið aftarliga, heldur hann.

Og úrslitini hava eisini verið á eini leið. Fyri bils er talan um fjórða pláss, og hóast GÍ var á odda sunnudagin, so heldur Magni ikki, at teir skulu vera so øgiliga ónøgdir.

– Soleiðis sum dysturin endaði - har vit høvdu tiggju mans - so kunnu vit ikki vera heilt ónøgdir. Men vit høvdu ein veldugan møguleika at økja til 2-0, beint áðrenn teir javna. Hevði tann bólturin farið inn um strikuna, so eri eg næstan vísur í, at vit høvdu vunnið. Ístaðin javnað teir, og so verða vit tr‡stir heilt nógv, tá Hans Jørgen fær seinna gula kortið, hóast eg haldi hetta var nakað tunt, staðfestir Magni Jarnskor.